# Suðuroyggin hevur ein glæsiligan møguleika

**- Um suðuroyingar samstarva, hevur oyggin ein glæsiligan møguleika, men uttan samstarv verður neyvan borið boð í bý, segði landsstýrismaðurin, Jógvan við Keldu á Krambatanga, tá ið hann heilsaði nýggja Smyrli vælkomnum**

SUÐUROYGGIN
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*- Møguleikarnir við hesum nýggja og stásiliga fari eru ovurhondsstórir, men aðalmálið er Suðuroyggin, segði Jógvan við Keldu, landsstýrismaður á Krambatanga*

*Mynd: Erik Christensen*

Jógvan við Keldu var við til móttøkuna, tá ið nýggi Smyril legði til bryggju á Tvøroyri. Landsstýrismaðurin slapp um Leirvíksfjørð við Brandal, koyrdi vestur í Vágar og haðani við tyrlu til Suðuroyar. Heimferðin var á sama hátt – við tyrlu, bili og báti um Leirvíksfjørð.

Í røðu síni á Krambatanga vísti Jógvan við Keldu á, at tað júst var hiðani av Tvøroyri, at fyrsta átakið varð framt við at skipa innanoyggjasigling.

- Hetta kom eftir, at ein tingnevnd í áravís hevði sitið við málinum – uttan, at nakað var komið burtur úr. Bráddliga kemur Mortensens handil upp í leikin, og uttan nakað uttanumtos byggja teir fyrsta Smirilin, sum varð brúktur til bæði danmarkarsigling og skotlandssigling – og eisini í ávísum førum til verju av føroyskum sjóøki.

Jógvan segði, at møguleikarnir eru ovurhonds nógvir við hesum nýggja og stásiliga fari, men legði dent á, at aðalendamálið er sambandið um Suðuroyarfjørð.

- Fyri 100 árum síðani gekk Suðuroyggin greitt á odda í mong ár og var ein glæsilig fyrimynd fyri hinar partarnar av Føroyum.

Hann segði, at í 1930-árunum liðu Føroyar – eins og allur heimurin - búskaparligt skipbrot, og hetta gjørdi eisini vart við seg í Suðuroynni.

- Eftir krígslok og heimastýrislógina, rendu Føroyar seg í eina sentraliseringartrongd av almennum fyritakssemi, sum allur útjaðarin síðani hevur kent sviðan av - og einamest Suðuroyggin.

Jógvan við Keldu vísti á, at suðuroyingar vóru væl fyri útbúgvingarliga. Teir fóru í útlond at lesa, men av tí, at almenni sektorurin var sentraliseraður, komu hesi ikki aftur til Suðuroyar.

- Í dag standa tit suðuroyingar fyri eini risa avbjóðing, sum ikki verður greidd uttan eitt dygt samstarv millum kommunur, vinnulív og fakfeløg.

Hann segði, at við sínum royndum sum borgarstjóri í eini útjaðarakommunu í 16 ár, kundi hann siga, at roknast skal ikki við teirri stóru hjálpini uttanífrá.

- Men um suðuroyingar samstarva, hevur oyggin ein glæsiligan møguleika. Uttan samstarv, verður neyvan borið boð í bý, segði landsstýrismaðurin.

Jógvan við Keldu:

# "Spyrjið onkran annan um tað"

**Jógvan við Keldu, landsstýrismaður, hevur onga viðmerking til, um møguleiki er fyri, at løgtingið við lóg fer at syrgja fyri, at strandfaraskipini verða undantikin arbeiðssteðginum**



*- Eingin viðmerking, sigur Jógvan við Keldu*

SAMFERÐSLA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað endurtekur seg ferð eftir ferð, tá ið verkfall, verkbann ella arbeiðssteðgur er, at tær oyggjar, har fjørður er til "fastlandið", verða serliga hart raktar, tí strandfaraskipini verða løgd. Serliga galið er tað hjá teimum, sum skulu um Suðuroyarfjørð, tí henda farleið er long, og farvatnið er sum oftast ringt hesa ársins tíð.

At løgtingið við lóg steðgar einum verkfalli ella verkbanni, er ikki so óvanligt, tá ið tað dregur út við at loysa ósemjur.

### Eingin viðmerking

Seinastu dagarnar hava tíðindi gingið um, at løgtingið møguliga fer at leggja seg út í arbeiðssteðgin, soleiðis at løgdu strandfaraskipini, eitt nú Smyril um Suðuroyarfjørð og Dúgvan um Leirvíksfjørð, kunnu fara í sigling aftur, men Jógvan við Keldu, landsstýrismaður, hevur onga viðmerking til hesi tíðindi.

- Nei, hatta havi eg onga viðmerking til. Tit mugu spyrja onkran annan!

Jógvan við Keldu heldur fyri, at fjølmiðlarnir eru skjótir at ringja til hansara, tá ið tað er okkurt negativt, sum er á vási.

Landsstýrismaðurin hevur tískil ongan hug yvirhøvur at gera viðmerkingar til eina møguliga uppílegging, nú siglingin hjá strandfaraskipunum um eitt nú Suðuroyarfjørð og Leirvíksfjørð liggur í andaleypi - og fólk noyðast at ferðast um hesar firðir um øðrum bátum.

## Sæunn í býráðið fyri Kára



Sæunn Ólavsdóttir Hansen hevur tikið sæti í Runavíkar býráði fyri Kára P. Højgaard, býráðslim. Hon situr frá 15. oktober og 14 dagar fram.

Sæunn sat í undanfarnu setu og var næstformaður í fíggjarnevndini, næstformaður í sosialu nevnd og stýrisformaður fyri Eysturoyar Røktar-og Ellisheimi.

Runavíkar býráð hevur í hesum valskeiði onga kvinnu sitandi, men nú Sæunn hevur tikið sæti fyri Kára, er ein kvinna millum tey 11, sum er talið av býráðslimur í Runavíkar býráði.

# Dýrt at ferðast um Suðuroyarfjørð

**Bátar, sum hava siglt um Suðuroyarfjørð við fólki í vikuskiftinum, nú Smyril liggur, hava tikið heilt upp í 400 krónur fyri einvegis túrin**

SIGLING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*




Arbeiðssteðgurin kostar dýrt hjá teimum, sum noyðast um Suðuroyarfjørð, nú Smyril liggur. Sluppin, Jóhanna, hevur gjørt onkran túrin, og tað hava bátarnir, Froyur og Silja Star, eisini. Aðrir bátar hava eisini siglt við fólki í vikuskiftinum.

Sosialurin veit við vissu, at onkur glastrevjabátur av Tvøroyri hevur tikið heilt upp í 400 krónur fyri hvønn fyri einvegis túrin um fjørðin. Hinvegin hava aðrir kravt minni, og eitt nú Froyur hjá Bjarka Skúvadal í Vestmanna, sum sigldi tríggjar túrar í vikuskiftinum, hevur tikið 200 krónur fyri hvønn vaksnan ferðandi – og 100 krónur fyri børn.

- Vit sigldu ein túr suður og norðuraftur leygardagin og tveir túrar sunnudagin. Froyur, sum er 14 metrar langur og 4,22 metrar breiður, kann hava 48 fólk við hvønn túrin. Samlaða talið av ferðandi hesar báðar dagarnar var eini 100, og tað er ov lítið til, at tað skal loysa seg at sigla fyri 200 og 100 krónur fyri hvønn ferðandi.

Bjarki Skúvadal sigur, at hann hevði ikki samvitsku til at taka meira frá teimum ferðandi.

- Vit væntaðu í staðin at fáa fullan bát, men tað fingu vit so ikki. Lutfalsliga lítil flutningur hevur verið suður, men norðuraftur hevur væl av fólki verið við.

Hann sigur, at Froyur bara sunnudagin brúkti fyri einar 7.000 krónur í olju.

- Vit royndu at gera siglingina so lagaliga sum gjørligt við at sigla millum Gomlurætt og Hvalba. Hesir túrar taka umleið ein tíma og 10 minuttir.

Spurdur, hvat hann heldur um ein prís upp á 400 krónur um Suðuroyarfjørð, sigur Bjarki, at hetta ikki er ov nógv, um bátarnir, sum sigla, skulu fáa nakað burtur úr hesum.

- Men hetta er meira, enn vit høvdu samvitsku til at taka, sigur Bjarki Skúvadal, sum ivast í, um Froyur fer at gera fleiri túrar um Suðuroyarfjørð í hesum umfari.